## EG MEINI TAÐ

# Hvar fór humanisman?



*Bergur Rasmussen skrivar:*

Malcom X segði einaferð, at vandamiklasta menniskjan á klótuni er maðurin, sum einki hevur at missa. — Orðini runnu mær til hugs, tá ið eg sá ta frálíku týsku sjónvarpssendingina um flogskipararnar, sum blivu heimskendir við ein brest, tá ið yvirgangsatsóknin varð framd móti New York. Tí tankin rakti meg, hvar er humanisman í hesum londunum? Hvussu trívist humanisman í miklari fátækt og sosialum órættvísi í einaræðislondum, sum verða stýrd eftir andaligum lógum? So sum so, ella als ikki?

Um vit kunnu siga, at nakað gott kom burturúr atsóknunum móti USA, so kunnu vit staðfesta, at rættvísiskrossferðin, George W. Bush spontant boðaði, tá ið hann segði, at tann, sum ikki var við var ímóti, í eini handavending setti andaliga miðaldarstýrið hjá talibanum til viks. Men vit mugu ansa okkum, at vit ikki sleppa humanismuni uppá fjall aftur í Afghanistan. Tí so verður tað sum í 80'unum, har tað eydnaðist Mujahedin við amerikanskum stuðli (og lyftum um frælsi og fólkaræði) at møða Reyða Herin so mikið, at russar stungu í sekkin og rýmdu norðuraftur, og harvið ruddaðu slóð fyri taleban. At russar fóru heim til glasnost, perestroika og eitt heimsveldi í lepum, er ein onnur søga, men eisini har hevði fólkið fingið nokk av lygnum, kúgan og vantandi vælferð. — Tí tað var humanisman við sínum kravi um opinleika og rættvísi, sum átti heiðurin, tá ið Sovjettsamveldið syndraðist og eingin annar!

Bæði vit í vesturheiminum, muslimarnir og kúgað fólk um allan heimin hava brúk fyri humanismuni. — Og tá meini eg ikki tann eftirgevandi hugburðin, sum í navni humanismunnar góðtekur mentanarliga kúging av medmenniskjum okkara, tí man er áh so hugtikin av fremmandum mentanum, tí kúgan er kúgan og kann ikki verjast útfrá mentanarligum og søguligum orsøkum, hvørki beinleiðis ella í yvirførdum týdningi. – Tað er einki, ið kann forsvara umskering av gentubørnum og steining av ótrúgvum kvinnum, bara fyri at nevna tvey dømi.

Vit hava brúk fyri teirri humanismuni, sum loyvir sær at seta orð á sambandið millum hendingar og gerðir. Teirri humanismuni, sum loyvir sær at seta spurnartekin við svørt-hvítu fatanina, ið býtir heimin upp í eitt vithini bílæt, sum jú var høvuðsorsøkin til, at niðurtøkan av tvíburðatornunum kom sum eitt sjokk hjá so nógvum. – Tað er ikki bara talan um andaligan ørskap, tí um arabaralondini vóru vælvirkandi vælferðarstatir, so høvdu tey sjálvi verið áhugað í (og helst eisini før fyri) at steðga teimum mest ekstremu bólkunum.

Vit eru so errin av, at vit liva í demokratiska partinum av heiminum við talifrælsi og trúarfrælsi, men hava vit gloymt, at hesi rættindi als ikki eru gudgivin? Tað er heldur tvørturímóti! — Tað var jú ikki fyrr enn djarvir einstaklingar (m&k) í hópatali vórðu beindir av vegnum ella settir í misálit, at fleiri og fleiri raknaðu við og kravdu, og at enda eisini fingu, lógarverkið aftur á verðsliga grund.

Og tað var tað, sum gjørdi okkum fræls.

Hopi bert, at humanisman yvirlivir 11. september 2001.

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro



*Sum hendan myndin úr Dimmalætting í september í 1962 vísir, so var Oyggjarvegurin í sera ringum standi. Tað var hetta, sum fekk Tórshavnar býráð at steingja vegin, og Petur Mohr Dam, løgmann, at taka málið upp á stjórnarstigi í Danmark. Endin var tó, at Forsvarets Bygningstjeneste traðkaði til…*

# Oyggjarvegurin ein deyðsfella

**Mikil orrusta var um Oyggjarvegin í 1962. Býráðið stongdi vegin, tí mett varð, at hann var ov vandamikil at koyra eftir. Semja varð seinni gjørd um, hvussu arbeiðið við vegnum kundi halda fram**

FYRI 40 ÁRUM SÍÐANI
*Eirikur Lindenskov*

Sosialurin skrivar 19. september í 1962 um Oyggjarvegin, sum enn ikki er bundin saman millum Havnina og Kollafjørð.

Blaðið skrivar: »Tórshavnar býráð hevur á eykabýráðsfundi gjørt landsstýrinum vart við, at kommunnunar partur av Oyggjarvegnum verður stongdur, um ikki nakað munandi verður gjørt beinanvegin fyri at bøta um hann.

Eisini hevur býráðið sagt landsstýrinum frá, at vegurin er sprongdur av koyring orsakað av tungum tólum og góðsi.

Býráðið hevur fingið svar frá landsstýrinum, men við tað, at tað ikki gongur býráðnum so mikið á møti, at ein nútímans umvæling kann fra fram, soleiðis at vegurin kann setast í ein tílíkan stand, at hann kann bera ta ferðslu, sum tað kann ætlast, at hann má og skal taka, sær býráðið sær ongar áðrar útvegir enn at steingja vegin fyri akførum.

Vegurin er í løtuni ein sonn deyðsfella fyri akfør.

Um ikki játtandi svar var komið til býráðsfundin í gjárkvøldið, vil býráðið taka tey neyðugu stig til steingja av vegin fyri akfør frá íkvøld at rokna.

Samtyktin er gjørd av øllum býráðslimunum.«

22. september 1962 skrivar Sosialurin, at býráðið í Havn nú hevur stongt Oyggjarvegin:

»Mikudagin gjørdi Havnar býráð av við 8 atkvøðum fyri at steingja Oyggjarvegin fyri allari koyrslu.

Hetta var so gjørt á midnátt. Tann parturin av vegnum, sum Havnar kommuna hevur latið gjørt, varð stongdur oman fyri grótbrotið niðan at markinum til Sundshagan, og innan fyri byrgingarnar vórðu settar stórar og tungar maskinur, ið vanliga verða nýttar til vegagerð.

Vegurin er ógvuliga vánaligur, og býráðarsins verkfrøðingur hevur sagt, at hann er ein sonn deyðsfella. Løgtingsins verkfrøðingar siga vegin at vera vánaligan, men kortini ikki so, at ikki er koyrandi á honum.

23. august hevur býráðið sagt landsstýrinum frá, at vegurin, tann parturin, sum kommunan hevur gjørt, er so vánaligur, at hann mátti verða stongdur, um ikki beinanvegin verður farið undir at bøta upp á hann. Hann varð sprongdur av koyringini til NATO-støðina. Teir bóðu um svar frá landsstýrinum áðrenn 15. september.

13. september svarar landsstýrið, men býráðið helt ikki, at tað veitti kommununi slíkar sømdir, at teir kundu góðtaka tær.«

Tann 14. september í 1962 fór løgmaður, Petur Mohr Dam, til Danmarkar at samráðast um peningaíløgu til vegagerð og her uppí fyrst og fremst pening til breiðkan av Oyggjarvegnum, skrivar Sosialurin eisini.

Ætlanin er, at Oyggjarvegurin skal hava somu breidd sum í minsta lagi sum vegurin frá Hórisgøtu í Kollfjarðardal, seks metrar, tí tað vil vera ógjørligt framveis at nýta vegin, so smalur hann er, og hartil vil hann við teirri nógvu koyring, ið nú er á honum, ikki verða til at halda í brúkiligum standi.

Við á ferðini var Helmsdal, landsverkfrøðingur, og ríkisumboðsmaðurin.

– Soleiðis liggur landið, tá býráðið fer fram eftir fummum og steingir vegin fyri allari koyrslu, staðfestir blaðið, og heldur fram:

– Ein fer tó at vóna, at hetta lítið umhugsaða stig býráðsins ikki fer at fáa til fylgju eina steðgan av samráðingunum um breiðkan av Oyggjarvegnum, tí tá hava Tórshavnar »vísu fedrar« reiðiliga sett krúnuna á verkið, sigur Sosialurin.

Sosialurin 26. september veit at siga, at løgmaður hevur sent fjarrit til Tórshavnar býráð, har hann sigur, at til várs (1963, red.) verður farið undir at gera hálvan annan km av Oyggjarvegnum oman fyri grótbrotið í somu breidd sum oman í Kollfjarðadal.

Vegurin letur nú uppaftur, og semja verður gjørd um vegaarbeiðið. Eisini verður semja gjørd við Forsvarets Bygningtjeneste um, at hon letur 175.000 krónur til arbeiðið.



Sjónvarpsfilmur um skaldið Jens Paula Heinesen

# Eitt dýpi av dýrari tíð!

**Seinasta hond verður í hesum døgum løgd á ein film um føroyska rithøvundan Jens Paula Heinesen, sum fyllir sjeyti 12. november. Filmurin skal lýsa persónin, umhvørvið og skaldskapin. - Tú kanst siga, at filmurin er ein "kærleiksheilsan" til føroysk listarfólk. Eg veit ikki, hvussu hann fer at eydnast, tað vil bara tíðin vísa, men eg havi so gjørt eina roynd, sigur Gulla Øregaard, sum stendur fyri framleiðsluni saman við Sjónvarpi Føroya**



*Ein glað Gulla*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

FILMUR
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Tankin um at gera ein film um Jens Paula Heinesen birtist eitt oktoberkvøld fyri tveimum árum síðan í Tilhaldinum í Havn, sum var karmur um eitt kvøld við upplestri av skaldskapi hansara. Gulla Øregaard minnist, at Jens Pauli Heinesen var sjálvur hjástaddur hetta kvøldið. Hon varnaðist nakað seinri, at Sandavágsskaldið fór at fylla 70 ár 12. november 2002, og setti hon sær sum mál at fáa gjørt ein film lidnan til henda dato. Síðan tá hevur filmurin og Jens Pauli Heinesen tikið nógv pláss. Eitt nú hevur hon í eitt ár, frá mai í fjør til mai í ár, verið í farloyvi úr sínum starvi á Almannastovuni, og hevur hon brúkt nógva orku at finna fígging, fakfólk, familju og onnur at viðvirka í filminum.

- Eg hevði lisið nakað av skaldskapinum hjá Jens Paula, áðrenn eg fór undir hesa ætlanina. Men eg dugdi ikki at seta skaldskapin inn í eina heild. Tí kendi eg á mær, at eg noyddist at lesa allan hansara skaldskap, skuldi eg fáa røttu myndina av honum, greiðir Gulla frá. Jens Pauli Heinesen er útbúgvin lærari, men hevur verið rithøvundur burturav síðan 1970. Hesi árini hevur hann latið úr hondum væl yvir 30 bøkur og umleið 5000 blaðsíður.

Filmsætlanin er býtt upp í ein høvuðspart, sum skal lýsa persónin Jens Paula Heinesen, og tríggjar sendingar, sum hvør í sínum lagi viðgera skaldskapin hjá honum. Í høvuðspartinum eru frásagnir frá uppvøkstrinum í Sandavági, hansara ár sum listarmaður umframt ein samtíðarlýsing av Jens Paula.

Sendingarnar um skaldskapin eru býttar soleiðis upp, at fyrsta sendingin viðger tema'ið bøðil og offur, sum gongur aftur í nógvum av skaldskapinum hjá Jens Paula Heinesen. Í aðru sending verða tvey av høvuðsverkunum hjá Jens Paula, "Á ferð inn í eina óendaliga søgu" og "Frænir eitur ormurin" viðgjørd og greinað. Og í triðju sending verða korini hjá føroyskum listarfólki fyrr og nú viðgjørd.

### Spennandi ætlan

Hóast filmsætlanin skjótt vísti seg at gerast rættuliga umfatandi, so hevur Gulla ongantíð mist vónina um, at tað nokk skal eydnast at fáa nakað burturúr. Frá fyrsta degi hevur hon havt Elina Heinesen, dóttir Jens Paula, at ráðgeva sær við verkætlanini, og eisini hevur hon fingið góðan stuðul aðrastaðni frá. Gulla Øregaard metir, at tilsamans 100 fólk hava verið við, so ella so, í verkætlanini at gera filmin.

– Tað hevði alstóran týdning, at tað frá fyrsta degi vóru fólk, sum trúðu uppá ætlanina, sigur Gulla. Hon leggur afturat, at hon sum heild hevur møtt stórari vælvild í arbeiðinum, og nevnir sum dømi, at hon fekk hollan stuðul frá Martini Næs, landsbókavørði, Jógvani Isaksen, bókmentafrøðingi og Ivani Niclasen, sjónvarpsmanni, tá hon av álvara fór undir at savna tilfar.

Størri og meiri umfatandi ætlanin gjørdist, meira spennandi gjørdist tað.

– Tað hevur eisini verið áhugavert at læra persónin Jens Paula at kenna, greiðir Gulla frá. Hóast hon hevur fingist við sjónleik í 40 ár, hevur hon ikki áður arbeitt við sjónvarpi og filmi.

- Mínar royndir hava verið eitt summarskeið í Herning, tá vit gjørdu filmsupptøkur í eina góða viku, og arbeiddi við øllum tættum. Hetta er sjálvandi ikki nøktandi, og er tað eisini orsøkin til at ráðgevi í filmsgerð er knýttir til verkætlanina, greiðir Gulla frá. Upptøkurnar eru gjørdar í Føroyum og í Danmark, og Bjarni Rubeksen frá Sjónvarpi Føroya hevur verið høvuðsfotografur. Upptøkurnar eru nú allar gjørdar og í oktober verður farið í holt við at klippa og seta tær saman til eina heild.

Lagið til yrkingina "Eitt dýpi av dýrari tíð" er nú sett út fyri symfoniorkestur, kór og solist. Jens Pauli Heinesen skrivaði yrkingina sum 21 ára gamal. Danski filmskomponisturin Søren Hyldgaard hevur saman við Elini Heinesen skipað filmstónleikin. Upptøkur eru gjørdar við einum symfoniorkestri úr Prag, sum spælir lagið, Tórshavnar Manskór skal syngja og solistur verður Elin Heinesen.

### Hugtikin av listarfólki

– Eg veit ikki, hvat tað er, men eg havi altíð verið hugtikin av listarfólki. Hví vilja tey tað, tey gera. Tað veri seg at mála, tekna, skriva ella spæla sjónleik. Tað er henda hugtøkan, fascinatiónin, sum hevur verið drívmegin í filmsætlanini hjá mær, greiðir Gulla frá og heldur fram:

– Jens Pauli er fyri mær ein stórur rithøvundi. Hann hevur einki fíggjarligt trygdarnet, gevur sín skaldskap út á egnum forlagi, og skal liva við misjøvnum viðmerkingum frá ummælarum. Eg spyrji ofta meg sjálva, hvat tað er, sum drívur verkið hjá einum tílíkum manni. Men nú veit eg, at tann listarliga tráanin hjá honum hevur verið so stór, at hon er leys av, at arbeiðið skal geva pengar.

Eftir at hon hevur lisið skaldskapin hjá Jens Paula, hevur Gulla havt nógvar samrøður við hann. Hon minnist eina av fyrstu samrøðum teirra millum. Tá letur úr Jens Paula: »Eg blívi so smæðin, tá eg skal seta ljósið á meg sjálvan – og mínar tankar, teir havi eg longu skrivað í mínar bøkur«. Gulla leggur tó dent á, at Jens Pauli alla tíðina hevur verið positivur og hevur virkað fyri, at filmurin skal gerast veruleiki.

Gulla Øregaard greiðir frá, at hon valdi at gera ein lýsing av Jens Paula Heinesen, tí at her er ein føroyskur listarmaður, sum hevur tikið stór tøk og prógvað, at tað ber til at vera listarfólk í Føroyum, hóast í førum tung kor.

– Tað verður sagt, at dygdin í einum samfelag skal mátast út frá, hvussu børnini og tey gomlu hava tað. Eg havi hug at siga, at skalt tú menna eitt samfelag, so mást tú geva skapandi fólki kor at virka undir — íløgan lønar seg aftur fleiri ferðir, sigur Gulla Øregaard og leggur afturat, at eydnast tað henni við filminum at vísa á, at listafólk eru áhugaverd, so er málið rokkið.

### Gleðir seg til endaliga úrslitið

Gulla greiðir frá, at higartil hevur arbeiðið við filminum verið ein góð prosess, og vónandi verður úrslitið av felagsarbeiðinum gott. Eftir tvey ára arbeiði er ikki sørt, at hon er spent uppá endaliga úrslitið.

Filmurin og sendingarnar um Jens Paula Heinesen verða væntandi at síggja í Sjónvarpi Føroya um tað mundið, tá rithøvundurin hevur sín sjeyti ára føðingardag, 12.november í ár.